tíðindablaðið
# sosialurin
Nr. 157 Leygardagur 19. august 1995 69. árgangur Krónur 7,00



## B36 vann steypið fyri fjórðu ferð

Ítróttirin síða 15-17

### Stóra fólkaflytingin:

## 1.000 føroyingar búgva nú í Møre og Romsdal

síða 4

### Helena Dam á Neystabø:

## Ivast um samgongan hevur álit á henni

*Helena Dam á Neystabø vil í vikuskiftinum hava at vita, um øll samgongan stendur aftanfyri hana í eygleiðarabólkinum*

síða 4

## Kommunuskúli í Havn í hundrað ár

síða 12-13



### Bonnerup:

## Gloymið alt um oljuna næstu tíggju árini

síða 3

GERIÐ ÁRSINS BILKVETT
á ÚTSØLU okkara leygardagin 19.8.
(sí lýsing á síðu 5) P/F WENZEL



*Formaðurin í Ráðgevandi Nevndini:*

# Tit kunnu gloyma alt um olju næstu 10 árini

*Føroyingar skulu heilt síggja burtur frá oljuni í tí búskaparliga tjaki,sum er í dag. Ein oljuvinna fer í fyrsta lagi at fáa nakra effekt um 10 ár og til ta tíð skulu búskaparligu trupulleikarnir verða loystir sigur Erik Bonnerup*

-Uttan mun til um útlitini fyri at finna olju í føroysku undirgrundini eru góð og gerast enn betri sum fraliður, so fer tað at ganga drúgv tíð, áðrenn ein oljuvinna fer at hava nakran búskaparligan týdning fyri Føroyar

Hetta sigur Erik Bonnerup, formaður í Ráðgevandi Nevndini, sum í farnu viku hevði samtalur við leiðaran á Oljufyrisitingini

Hann vísir eisini á, at vit heldur ikki eiga at gloyma, at viðurskiftini við Føroyar eru sera kompliserað

-Vit hava leingi vitað, at tað finnast stórar nøgdir av olju eystan fyri markið, men at talan higartil hevur verið um kompliserað viðurskifti í undirgrundini

Erik Bonnerup heldur tí, at nógv skal fella upp á pláss, áðrenn ein verulig oljuvinna kann fara í gongd í Føroyum

-Sjálvt um tað gongur "sum smurt í olju" so fer ein oljuvinna í fyrsta lagi at fáa nakra effekt um 10 ár. Og til ta tíð skulu trupulleikarnir í Føroyum verða loystir

Erik Bonnerup heldur tí, at føroyingar skulu heilt síggja burtur frá oljuni í tí búskaparliga kjaki, sum er nú

*-Tað hevur verið ført fram í Føroyum, at danir hava ein plan við Føroyum. Ein partur av hesi ætlan er at pína niður føroyska búskapin og tjóðina so mikið nógv, at føroyingar, tá teir skulu gjalda aftur stóru skuldina verða tvingaðir til at lata donum oljuna!*

-Eg havi hoyrt hatta. Skuldi eg svara eitt sindur ódiplomatiskt, so vil eg siga, at ein skal lata vera við at síggja spøkilsi á ljósum degi. Tað er mín avgjørda sannføring, at hesar gitingar einki hava við veruleikan at gera

**jan**

THE WORLD COUNTS ON
TRULY®
16K DATA MEMORY



MODEL
MD167A
kr. 295,-
SPARD KRÓNA ER VUNNIN KRÓNA
pappírslonin
Sverrisgøta 9 • FR-110 Tórshavn
Tlf. 10603 • Fax 10806 • Box 195

UPPLATINGAR
TILBOÐ
Í sambandi við at vit eftir eldsbrunan lata upp í nýggjum hølum í
HANDILSKJARNANUM
Niels Finsensgøtu 8
mánadagin 21. aug., kl. 9
hava vit hópin av einastandandi TILBOÐUM
DØMI: NOKIA lit- og tekstsjónvarp



– millum heimsins mest framkomnu og við hentleikum og myndadygd, ið ber av øllum
NOKIA 6355 25"
TILBOÐ 7.950,-
NOKIA 7155 28"
TILBOÐ 8.950,-

NOKA Sat. 2202 parab.



85 cm, kann programmerast til 200 rásir. 3 ár á rað heiðraður parabolur sum heimsins besti í sínum flokki.
TILBOÐ 4.450,-



NOKIA videobandupptakari við øllum hugsandi hentleikum.
TILBOÐ 3.650,-

Umframt tilboðini øll lata vit ÷15% AV ALLARI VØRU mánaðin út

FÍGGING kann útvegast
DYGD & TRYGD
Vit lata samstundis upp nýmótans verkstað, ið greiðir allar umvælingar.

RADIOHANDILIN
v/ E. & P. Persson p/f Box 119 · Tlf. 18277 · Fax 18377
N. Finsensgøta 8